# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Revsing ella seming

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, sigur við blaðið, at hann er vorðin frystur út úr tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum og flokkurin hevur ikki boðið honum við í valbólk. Hetta kemur í ljós í sambandi við, at løgtingsnevndir skulu umskipast. Nevndirnar skulu sum kunnugt umskipast eftir, at Sjálvstýrisflokkurin er vorðin samstarvsflokkur hjá CHE samgonguni. Gerhard fýlist samstundis á samskiftið í Javnaðarflokkinum, har tað opinbert ikki verður tosað um trupulleikarnar. Tingmaðurin heldur seg tí ikki hava aðrar møguleikar enn at fara í valbólk saman við andstøðuni, nú Javnaðarflokkurin ikki vil rætta hondina út móti honum. Hetta er ein sera beisk atfinning, sum almenningurin átti at fingið eina viðmerking til frá floksleiðsluni.

Tað hevur ikki verið vanligt á tingi at latið kenslur ráða, tá flokkar hava myndað valbólkar. Tá valbólkur verður skipaður, ræður um at vinna sum mest av politiskari ávirkan. Jú størri valbólkur hjá eitt nú eini samgongu er, jú størri er ávirkanin. Tá tú gert valbólk ger tú samstundis avtalur, og eingin er so lítið at sær komin, at hann ella hon fer at bróta hesar avtalur. Tann flokkur, sum revsar ein tingmann við at frysta hann úti frá valbólki og nevndarbýti, revsar bert seg sjálvan, og minkar samstundis um ávirkan sína. Ein slíkur atburður hevur ongantíð á tingi verið mettur sum skilagóður politikkur.

Heini O. Heinsen er í næstan somu støðu, sum Gerhard, men her tykist kortini at vera ein ávísur munur. Forkvinna Tjóðveldis á tingi læt herfyri skilja, at ongar dyr vóru stongdar fyri Heina, og tað var soleiðis upp til Heina sjálvan, um hann kom inn aftur ella hann varð standandi uttanfyri í politiska kuldanum. Nú vita vit ikki í skrivandi stund, hvørjum hetta endar við, men tað skuldi ikki undra, um Heini ikki, tá avtornar, er fullgyldugur limur av tingbólki Tjóðveldisins. Sjálvur hevur Heini í samrøðu her í blaðnum gjørt púra greitt, at hann væntar sær nevndarsess. Hann sigur orðarætt, at hann gongur bara út frá, at hann er partur av valbólkinum hjá samgonguni, og at hann í minsta lagi varðveitir sessin í vinnunevndini.

Heini fer valla út við hesum boðskapi uttan at hava ein varhuga av, at soleiðis fer tað at ganga. Tað liggur tí nær at hugsa, at Heini sleppur inn aftur. So er spurningurin, hvat leiðslan í Javnaðarflokkinum ger við Gerhard. Hon kann velja at revsa Gerhard, og hon kann velja at koma til sættis við Gerhard, sum jú her í blaðnum í gjár gloppaði dyrnar. Hetta snýr seg um at sýna stórsinni ella um hevnd. Hevndin, gagnar, sum skrivað stendur, ongum. Samgongan yvirlivdi stjórnarkreppuna, og leiðslan hevur boðað frá stórum politiskum ætlanum. Kanska skuldi leiðsla Javnaðarfloksins nýtt høvið at vaska talvuna og roynt seming, bjóða Gerhardi inn aftur í politiska varman – við ávísum treytum sjálvsagt. Hetta mátti, við undirtøku floksins í huga, verið vert at umhugsa.

**Sosialurin**

**Málið um fiskidagarnar:**

## Jan Højgaard bað um skerjing av fiskidøgum

**ÓLI JACOBSEN**



Tað er ein nýggj kensla at sita á síðulinjuni og fylgja við tí árliga slagsmálinum um fiskidagarnar. Júst hetta var eitt av teimum stóru økjunum hjá FF, har felagið saman við hinum feløgunum í vinnuni við hjálp av útlendskum serfrøðingum fingu eitt mótspæl til almennu fiskifrøðina.

Hetta saman við øðrum fiskivinnumálum er nú av Jan Højgaard persónliga avreitt til nakað, sum eitur Samtak.

Tað kann sjálvsagt vera skilagott við einum slíkum samstarvi millum fiskimenn og arbeiðarar, um samstarvið umfatar tey mál, sum hesir stættir hava felags. Ein treyt er eisini, at talan er um samstarv millum javnbjóðis partar.

Men tað er púra greitt, at FF er bert eitt "páheng" í Samtak. Afturat hesum er tað greitt, at FF gjøgnum Samtak í fleiri førum beinleiðis arbeiðir ímóti áhugamálunum hjá fiskimonnum.

Hetta kom fyrst til sjóndar, tá ið Samtak enntá tvær ferðir hevur kravt samtyktu skattalækkingarnar fyri 2008 afturtiknar. Hetta vildi ikki kostað arbeiðarainntøkum nevnivert. Men tað vildi kostað fiskimannainntøkum túsindir av krónum. Afturat hesum hevur Samtak kravt hægri kommunuskatt fyri hægri inntøkur. Hetta vil eisini koma at kosta fiskimonnum meira skatt. Slík sjónarmið mugu slætta vegin fyri avtøku av sjómansskattaskipanini, sum FF í síni tíð bardist fyri at fáa og síðan fyri at verja. Hon hevur higartil givið sjófólki meira enn 600 milliónir krónur, og man vera størsta hál nakað fakfelag hevur fingið í einum.

**Hevur sjálvur kravt niðurskurð í fiskidøgum**

At FF gjøgnum Samtak mótarbeiðir fiskimonnum vísir betri enn nakað tann yvirlýsing, sum kom í august um kreppuna í fiskivinnuni, har FF aftur gongur beint ímóti áhugamálunum hjá fiskivinnuni á sjónum og harvið fiskimonnum.

Her gongur FF ímóti, at forðingin fyri at virka fisk umborð á skipunum verður avtikin.

Tað er viðurkent, at við teimum høgu oljuprísum kann vera stórur vandi serliga fyri trolaraveiðuni eftir ráfiski. Her er tað kanska ikki longur ein spurningur, um fiskur skal virkast á landi ella á sjónum, men um hann kann fiskast yvirhøvur av føroyskum skipum. Tá kundi tað verið ein møguleiki at virka fisk umborð á skipunum. Tað er ein royndur lutur, at hetta er meira lønandi enn at landa fiskin feskan.

Hetta vildi í hvussu er tryggjað, at fiskurin verður virkaður av føroyingum. Hetta kundi varðveitt og kanska økt arbeiðsplássini hjá føroyskum fiskimonnum. At seta seg ímóti hesum er at skaða áhugamálum fiskimanna.

Tað sama er við tilmælinum um áseting av fiskidøgum. Í somu yvirlýsing verður sagt:

"Feløgini í Samtak harmast um, at stovnarnir ikki hava verið betri røktir seinastu árini. Feløgini vóna veruliga, at landsstýrið og løgting taka henda spurning í álvara og gera nøkur munadygg tiltøk, sum kunna vera við til at tryggja, at toskurin og onnur fiskasløg kunna menna seg aftur í føroyskum sjóøki".

Henda orðing, sum eisini er undirskrivað av Jan Højgaard, kann bert fatast sum ein áheitan á politisku myndugleikarnar um at skerja fiskidagatalið. Serliga skal hetta gerast á húkaflotanum, sum júst er tann, sum fiskar tosk.

Torbjørn Jacobsen hevur havt alla grund til at halda, at hansara uppskot um fiskidagar var fult út í samsvar við hesi sjónarmið.

At pípan seinni fekk eitt annað ljóð váttar bert, hvussu lítil samanhangur er í tí, sum verður sagt nærum frá degi til dags. Hetta skapar í hvussu er ikki virðing fyri fiskimannafelagnum ella fiskimonnum!

Tá er munur á formanninum í Meginfelag Útróðrarmanna. Hann hevur alla tíðina havt eina greiða støðu í hesum máli, og tað er eisini honum lurtað verður eftir. Hann, sum hevur tvær tungur í einum heysi, verður als ikki tikin upp á tunguna!

Hetta merkir, at á slíkum avgerandi økjum hevur Jan Højgaard flutt avgerandi støðutakanir í fiskimannamálum, sum FF upplagt skuldi staðið fyri, til Samtak, har hann sjálvur bert er ífylla og kanska enn ikki veit, hvat hann leggur navn til við tí førleika hann hevur.

Hetta kemur ikki óvart á nakran við tí destruktiva hugburði, sum Jan Højgaard annars hevur lagt fyri dagin frá fyrsta degi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.